VIÐMERKINGAR

# Aldri hevur nakar gjørt so nógv burtur úr so lítlum

**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður*



Tá víðagitna poppstjørnan Michael Jackson fyri árum síðani hevði framførslur í Kekkia, var ein av kendu tónleikaviðmerkjarunum spurdur, hvat hann metti um tónlistarligu avrikini hjá Jackson. Viðmerkjarin var eirindaleysur. Hann helt onki um lættisoppatónleikin og kom til ta niðurstøðu, at "aldri hevur nakar gjørt so nógv burtur úr so lítlum." Somu hugsan freistast ein til at hava um tað, sum verður borðreitt fyri føroysku veljarafjøldini nú til Fólkatingsvalið. Flestu flokkar, helst allir, royna at pakka boðskapin í so vakurt gávupappír, sum hugsast kann.

**Hvussu við innihaldinum?**
Sjálvandi ræður um at selja ein boðskap so væl sum tilber. Onki forgjørt er í tí. Men tó eigur veljarin at hugsa meiri um innihaldið í pakkanum, tí tað verður innihaldið, sum kemur at gera munin, tá valdagurin er farin afturum. Miðflokkurin hevur ikki umstøður at pakka boðskapin inn í vakrar valplakatir, traktatir og bløð í hvørt heim í Føroyum osfr. Men tó hava vit ein týðandi boðskap, sum á allan hátt hevði staðið sína roynd á Fókatingi.

**Boðskapur Miðfloksins**
Boðskapur okkara snýr seg ikki í fyrstu atløgu um ríkisrættarligu støðuna ella um høgra/vinstra-politikk. Okkara boðskapur snýr seg um grundarlag okkara sum fólk, familjur og einstaklingar. Og um grundarlag norðurlendinga. Krossmerkið í fløggunum bera boð um eina sterka fólkasál, har virðing fyri Skaparanum, fyri lívinum og fyri hvørjumøðrum hevur hægstu raðfesting. Lond, har kristna lívsáskoðanin hevur verið hjartað í samfelagnum á flestu mótum; í heilsuverkinum, skúlaverkinum, mentanarlívinum, vinnulívinum, ja sjálvt fólkaræðið byggir á hesa grund. Og úrslitið er hareftir. Í dag eru norðurlond ævintýrheimur fyri flestu øðrum fólkasløgum. Samfelagsskipanin í hesum londum er fremsta fyrimynd fyri flestu tjóðir, og í vælferð kunnu onnur lond illa samanberast við norðurlond.

**Vandaleið**
Men seinastu hálvu øldina eru nøkur farin at sigla vandaleið. Meir og meir. Og hesum er tað, Miðflokkurin reisir seg ímóti. Ella rættari sagt: vit reisa okkum fyri teimum lívsvirðum, sum løgdu lunnar undir okkara vælferð. Tí fara vit sum samfeløg at byggja hús okkara á sand, er vandi á ferð. Flóðaldan av sjálvsøkni, har tann einstaki bara skal gera, sum honum lystir uttan ábyrgd og virðing fyri lívinum, vil sum frálíður forkoma okkum sum tjóð. Hesa leið er Danmark saman við mongum øðrum londum farið inn á. Og Miðflokkurin vil ikki frásiga sær ta ávirkan, sum ein føroysk rødd á danatingi kann hava á hesa gongd. Vit vilja heilt greitt greiða dønum frá tí góða boðskapinum, sum einaferð var teirra ástøði, og sum tíbetur framvegis er grundarlag føroyinga. Hví ikki?

# Fólkatingsvalið 2005

**Jan Højgård**
*Valevni miðflokkins til fólkatingsvalið 2005*

Í fjør komu tíndi fram í Danmark, at skattalættin hjá føroyskum fiskimonnum var fíggjaður við blokkinum úr danska ríkiskassanum.

Hetta hendur meðan føroyskir fiskimenn arbeiða fyri 25-30 kr. um tíman, meðan fiskimenn eru við skerdan lut so at siga allastaðni í tí føroyska samfelagnum. Rættindini hjá fiskimonninum verða brotin av ALS og Tryggingarfelagið Føroyar.

Sum um ikki ágangurin var nok í Føroyum, fóru óndar kreftir í gongd við at lúgva uppá tann føroyska fiskimannin. Tann føroyski fiskimaðurin var lagdur undir lygn oman á lygn. Allastaðni har tað var gjørligt, var meinbogi lagdur fyri tann føroyska fiskimannin. Tað vóru lagdar vrangar útrokningar og lønútgjaldingar á heimasíður. Tað var propagandera fyri donskum fólkatingslimum í besta nazi stíli. Danska sjónvarpsrásin TV-2, var fóðra við somu lygnum.

Henda brutala og ónda lygn førdi til stóra vreiði, bæði her heima og í Danmark. Henda lygn var til skaða fyri umdømi hjá føroyingum í Danmark. Tí betur fyri heiðurligar føroyingar, bleiv henda lygn avdúka. Tað vísti seg, at tað var ein víðgongdur bólkur í føroyum, ið stóð aftan fyri alopið á sínar heiðurligu landsmenn. At hugsa sær, at fara út við eini so grovari lygn móti sínum egnu landsmonnum, tað er skakandi og særandi, ja bara so ófatuligt.

Hvat gjørdu tey føroysku umboðini á fólkatingi? Eg spyri meg sjálvn, mundu annað av teimum taka undur við lygnuni? Var tað møguliga við í ætlani hjá hesum ekstremistiska bólki, at í uppgerðini við danir, skuldi tað besta, ið føroyingar áttu skuldi ofrast, tann føroyski fiskimaðurin. Tey umboð vit høvdu á danatingið, gjørdu ikki sína skyldu í hesum ádámliga máli.

Vel tí ein sterkan miðflokk á danating. Miðflokkurin fer at varpa ljós á sannleikan og kunna danir um føroysk viðurskifti.

# Fólkatingsval 05: Aftur eitt val

**Mannbjørn Jacobsen**



Fólkatingsvalið nú um fáar dagar, er eitt av vanligu taktisku donsku valunum, fyri at styrkja støðuna hjá sitandi stjórn, við møguleikanum, at sleppa frá at koma í veikari støðu, tá val undir øllum umstøðum skal verða, 4 ára skeiðið runnið.

Fogh, ella rættari tulkingar av hugsan hansara, hevur longi høtt við vali, men nú helt hann, at rætta tíðin var, nú veljarakanningar hjá andstøðuni eru so vánaligar.

At hava val í úrtíð, tá stjórnin er væl fyri, andstøðan illa fyri, í veljarakanningum, er møguligt í fleiri londum, ikki øllum, ikki í USA td.

Hóast valið av øllum verður mett eitt lagnuval, er áhugin ikki tann stóri, raksturin minni enn vanligur. Kanska halda flestu, at ongin spenningur er, alt er avgjørt frammanundan.

Veljarakanningar higartil geva ikki meir og minni skipaðu andstøðuni nakran møguleika. Onki tykist benda á, at nakað stórvegis broytist har.

Nýggjasta preiið er, at Radikalu verða óvanliga stórur sum flokkur, kanska fer tað at misseydnast í seinasta enda. Onkur tosar um eitt skifti yvir í eitt nýtt spenni, ístaðin fyri vinstra, høgra, so tað eru Radikalu, Dansk Folkeparti, har høvuðsanstøðurnar eru gamla Danmark, Altjóða samfelagið (Globaliseringin), innflytaraspurningurin og vitanar samfelagið, ella rættari skapanarsamfelagið, har gomlu vóru stættir og stættarhugmyndafrøðir. Neyvan eru teir mentir tað.

Ein klár gongd er ávís polarisering nær miðjuni um Venstre øðrumegin og sosialdemokratíið, Radikalu, SF hinvegin, við smáu miðflokkunum úti.

Hetta fer neyvan at broyta stjórnarmøguleikan, um nýggjur møguleiki við gamla VKR bjóðar seg um Venstre hesaferð, til tað er ov stórur munur á Venstre og Radikalu í øðrum enn útlendinga málum, skúlamálum td.

At Radikalu verða eins stórir og sosialdemokratarnir, so teir høtta leiðandi plássið har, er ikki møguleiki í álvara, so nógv náa sosialdemokratarnir ikki at dumma seg.

Mest hugsandi er at stjórnin framheldur, hendir okkurt heilt óvæntað ikki, styrkt, andstøðan framheldur sum andstøða, sosialdemokratarnir eitt sindur slignir fyri nevið, Radikalu við einari styrki, teir ikki reiðiliga kunnu brúka til nakað, SF møguliga styrkt eisini, eindarlistin um tað sama.

Vónleysir leiðslutrupulleikar eru í flestu flokkum, uttan eindarlistin, har ongin leidsla er, minst kanska í Radikalu, har rímulig boð bjóða seg.

Ráðharramøguleiki hjá SF, sum nú var í ljósmála, verður av ongum (hesaferð). Ongin greiður útskiftingar leiðari er at hóma, antin eru teir ov gamlir, ella annaðleiðis fólkaslag, enn vant har.

Sosialdemokratarnir hava onki veruligt annað boð enn Lykketoft, Auken kemur neyvan aftur í formanssessin. Møguleikin við New Labour byrjaður av Nyrup, er brádliga vendur frá, heilt óvæntað, fólk á goymslu, heilt frá ungdóms uppreistrinum aftur úti á vøllinum. Helst var tað hesin løgni talvleikur, sum fekk Fogh at skriva val út so brádliga.

Á nógvan hátt ber valið merki av, at politikkurin hjá sosialdemokratunum er uppbrúktur. Eitt lið av vinstravongsfólki heilt frá 69, er komið á ovasta tind í flokkurin. Á hesi leið er allur vinstravongspolitikkur lagdur eftir, so tá tað ikki rakk, allur vanligur sosialdemokratiskur politikkur, so sum ein sannførandi kritiskur stuðul til USA, fakfelagstilknýti, egin innflytarapolitikkur, skatta og búskaparpolitikkur er veikur at hóma hjá veljarum. Alt fyri at náa tað. Nú sær út til, at ikki ber meir.

Nakað í politiska bygnaðinum ger tað truplari at vera sosialdemokratur í dag, enn áðrenn Glistrup syndflóðina, Dansk Folkeparti ger tað verri, klovnaríið er av, yvirboðspolitikkurin er ikki so nógv meir, men flokkar í høgra bjóða seg fram við sosialdemokratiskum málum á skránni, sum teir gera nógv burturúr, eldrabólkurin er stórur í dag. Nógv er eyðmýkjandi fyri sosialdemokratar at hoyra. Teir kallað tað hýklarí og demagogi. Tað virkar eins væl.

Hetta høgraskrædl má vera komið í, tí teir hava mist hald á egnum veljarum í stóran stíl. Hugmyndafrøðiligir áhugar, uttan áhuga, mugu havt køvt nakað av vanliga skilinum.

Høgrasíðan flennir eftir, at "Lykketoft er godt pakket ind" við myndamáli frá fótbóltsdystum.

Opningin av meginpartinum av politiska vøllinum heilt til til vinstru fyri soasialdemokratarnar og lutvís SF, fyri lættisoppafólk, sum fær til gávis eitt spæliplláss, er úrslit av dogmatiskari, sekterismu í vinstraflokkum, uttan áhuga, men bara fyri at verja áhugamál hjá smábólkum, er eyðkent fyri Danmark frammum øll lond.

Tungt er at koma úr hesum aftur, tí hvørt eftir sínum er, og knýpandi nóg stórur álvara er í øðrum pørtum av flokkunum.

Høvuðstrupuleikin er, at tað letur til, at leikluturin á fremstu rók tykist fremmandur, og hevur ikki upprunaliga verið ætlaður, men politisering longri úti á síðulinjuni.

Syrgiliga er, flennir høgra síðan eftir, at nógvir sosialdemokratar eru til, teir sóknast aðrastaðir. Onkur segði at leiðslan var á vinstravonginum men hevði ongan flokk.